## Arsenal í finaluni

Longd leiktíð skuldi til, tá Arsenal á Emirates Stadium sendi Tottenham úr lítlu enskuk steypakappingini – Carling Cup. Fyrri dysturin á White Hart Lane endaði við 2-2 javnleiki, og eftir 90 minuttir á Emirates, stóð 1-1 á talvuni. Adebayor tóktist annars hava sent Arsenal á sigurskós, men stutt fyri leiklok javnaði Mido fyri Tottenham. Í longdu spælitíðini setti Arsenal tó tingini upp á pláss. Jeremie Aliadiere skeyt teir upp á 2-1, áðrenn Pascal Chimbonda gjørdi sjálvmál til endaligu støðuna.

## Føroyingurin sjúkur



Hans Lindberg, sum er partur av danska manslandsliðnum, hevur føroyskt blóð í æðrunum umvegis pápan, ið er ættaður av Tvøroyri. Men tað verður helst uttan hann, at danir í kvøld fara at takast við Pólland um pláss í HM-finaluni. Lindberg hevur nevnliga fingið krím, og tí liggur hann í seingini, nú liðfelagarnir leggja seinastu hond á fyrireikingar sínar.

# Fritz hevur víst vegin

**Týskland er bara blivið betri og betri, sum kappingin er liðin, og nú eru teir komnir í hálvfinaluna, har favorittarnir og evropameistararnir úr Fraklandi bíða. Fer Týskland at steðga enn einum favoritti**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Málverjin, Henning Fritz, hevur verið stóra stjørnan hjá Týsklandi higartil í kappingini. Nú skulu hann og Týskland royna at bara Fraklandi í hálvfinaluni.*

Heimavøllurin hevur uttan iva verið ein dyggur stuðul hjá Týsklandi í HM-endaspælinum. Til mest sum hvønn dyst hava túsundtals týskarar staðið og heppað teirra lið, og hetta hevur óivað verið við til at lyft Týskland. Einki skal tó takast frá týsku leikarunum. Teir hava víst ótrúligan vilja og og ótrúligan gejst á síni leið til hálvfinalurnar.

Týskland var eisini mett at hava fingið eitt sera gott lutakast undan HM-endaspælinum, har teir vóru endaði í bólki saman við Brasilia, Argentina og Póllandi. Byrjanin var eisini góð. Í fyrsta dystinum vunnu teir á Brasilia, sjálvt um spælið ikki var av tí besta, og í næsta dystinum vunnu teir enn einaferð, tá teir møttu Argentina. Í seinasta dystinum steðgaði tó upp. Her møttu teir Póllandi, og flest øll væntaðu enn ein týskan sigur. Pólland vildi tað tó øðrvísi og vann ein upibornan sigur, og so mátti Týskland víðari til millumumfarið uttan stig.

### Týskland vísti stórspæl

Hevði gongdin verið minni góð í innleiðandi bólkinum, so vísti Týskland sanniliga stórspæl í millumumfarinum. Nú tóktust teir hava blakað nervarnar, og í fyrsta dystinum vunnu teir trygt á Slovenia. Nú høvdu teir veruliga fingið gongd á, og so gekk slag í slag. Í næsta dystinum vunnu teir enn ein tryggan sigur á Tunesia, áðrenn teir skuldu møta Fraklandi. Enn einafeð tók Týskland øll á bóli, tá teir vunnu ein sannførandi sigur á evropameistarunum, og so var bara Ísland eftir í síðsta dystinum. Aftur hesaferð vann Týskland, og sostatt endaðu teir á øðrum plássið í sínum bólki í millumumfarinum, har teir høvdu vunnið allar sínar dystir.

Nú bíðaðu sponsku heimsmeistararnir í fjórðingsfinaluni, men hetta lat Týskland seg ikki nerva av. Eftir ein javnan dyst dró Týskland longra stráið ímóti endanum, og við einum tvey mála sigri gjørdust teir klárir til hálvfinaluna, har teir skulu møta Fraklandi.

### Fantastiski Henning Fritz

Profilurin á týska liðnum hevur uttan iva verið fantastiski málverjin, Henning Fritz, sum fer aftaná ferð hevur pilkað sjálvsálitið av mótstøðumonnunum. Hann byrjaði ikki so væl í endaspælinum, men síðstu dystirnar hevur hann víst støði í heimsflokki.

Stóra styrkin hjá Týsklandi er annars ikki teir stóru profilarnir, men heldur liðið sum ein heild. Pascal Hens, Michael Kraus, Christian Zeitz, Holger Glandorf, Florian Kehrmann, Michael Janssen, Sebastian Preiss og Christian Schwarzer eru allir klassaleikarar, tá teir spæla upp til sítt besta, og við so nógvum góðum leikarum og túsundtals týskum áskoðarum í rygginum, so skal liðið helst fáa eitt gott úrslit á heinavølli. Nú eru teir í hálvfinaluni, og ikki er óhugsandi, at Týskland kann fara allan vegin.

# Favoritturin livir enn

**Frakland var helst størsti favoritturin undan kappingini, og eftir eina heldur trilvandi byrjan tykjast teir nú vera komnir í gongd. Sigurin á Kroatia í fjórðingsfinaluni boðar frá styrki, og tí kunnu vit helst vænta enn meir av fronsku favorittunum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri júst einum ári síðani vunnu franskmenn evropameistaraheitið í stórum stíli. Einki av hinum liðunum kláraði at steðga teimum í teirra royndum at vinna EM, og tí blivu teir eisini skírdir sum helst størstu favorittarnir at vinna heimsmeistaraheitið í Týsklandi.

Hetta er heldur ikki so løgi. Við leikarum sum Narcisse, Guigou, Omeyer, Abalo, Fernandez, brøðrunum Gille og kanska besta hondbóltsleikara í heiminum í løtuni, Nikola Karabatic, var enn einaferð líkt til, at Frakland hevði møguleika at fara allan vegin í HM.

Byrjanin var tó ikki tann besta. Í fyrstu tveimum dystunum var annars eingin slingur í valsinum. Tá vann Frakland fyrst stórsigur á Ukreina, og síðani bukaðu teir Avstralia. Í síðsta innleiðandi dystinum møttu teir Íslandi, sum skudli vinna dystin fyri at koma víðari. Her fekk Frakland veruliga oyruni í maskinuna, tí Ísland vann við heili átta málum. Frakland var tó klárt til millumumfarið, har teir komu víðari uttan nakað stig.

### Svingandi úrslit

Í millumumfarinum fekk Frakland enn einaferð eina flúgvandi byrjan. Í fyrstu dystinum vunnu teir tryggan sigur á Póllandi, áðrenn teir møttu Slovenia í øðrum dysti. Aftur her vann Frakland ein knúsandi 14 mála sigur, og júst sum øll hildu, at nú høvdu evropameistararnir fingið gongd á, so taptu teir. Í triðja dystinum ímóti vertunum úr Týsklandi fingu teir slett ikki gongd á spælið. Týskland førdi at kalla allan vegin, og so tapti Frakland aftur. Teir høvdu tó longu tryggjað sær víðari luttøku til fjórðingsfinalurnar undan seinasta dystinum í millum-umfarinum, so tí bilti ikki so nógv við tapinum fyri vertunum. Í síðsta dystinum vann Frakland tepurt á Tunesia, og so skuldu teir møta Kroatia, sum var einasta ósigraða lið í kappingini, í fjórðingsfinaluni.



*Thierry Omeyer og Nikola Karabatic eftir sigurin á Kroatia í fjórðingsfinaluni. Teir báðir vera sera týdningarmiklir í hálvfinaluni ímóti Týsklandi.*

### Omeyer er vaknaður

Fjórðingsfinalan ímóti Kroatia gjørdist ein sera tættur dystur, har málverjarnir gjørdust avgerandi. Her var Thierry Omeyer í franska málinum einki minni enn fantastiskur, og so vann Frakland dystin við trimum málum. Við sigrinum høvdu teir sligið ein av størstu favorittunum út úr HM-endaspælinum, og Thierry Omeyer, sum ikki hevur verið serliga yvirbevísandi í fyrstu dystunum, tykist hava funnið formin júst í røttu løtu.

Fær Frakland sítt spæl at koyra víðari í kappingini, so verður ilt at meta um, hvør klárar at steðga teimum. Týskland hevur gjørt tað fyrr í kappingini, men tá spældi Frakland ikki upp til sítt besta. Fáa Daniel Narcisse og Nikola Karabatic álopsspælið at rigga ímóti vertunum, so vera teir ringir at steðga.